# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Dagurin í morgin

**1. desember. Arnaldur**. Er eitt av teim elstu nøvnunum í halgramanna tali, tað er eitt sindur tvørligt at fáa skil á, hvør hesin Arnaldur hevur verið. Fleiri við sama navni verða nevndir, og teir flestu halda, at her verður sipað til ein franciskanaramunk, sum fór til Kina í 1303 sum trúboðari.

Navnið er gamalt týskt, sett saman av *arn*, sum merkir *ørn* og *wald*, ið merkir tað sama sum føroyska orðið *vald*, *hersi*.

## RÆTTING

Í redaktionella nekrologinum yvir Ingálv av Reyni var tíverri eitt navn gloppið burtur ímillum, tá ið børnini hjá Elsu og Ingálvi vórðu nevnd. Brotið átti at ljóðað soleiðis:

Børnini hjá Elsu og Ingálvi eru: Kári føddur í 1946, Gunnvør fødd í 1948, Heri føddur í 1949, tvíburðarnir Eyðun og Árni føddir í 1951, Ingi føddur í 1952, Ása fødd í 1955 og Inga fødd í 1962. Ingi doyði í 2001. Gunnvør býr í Danmark, og øll hini búgva í Havnini.

Vit biðja lesararnar um at halda okkum til góða.

**blm.**

Tórshavnar alfrøði:

# Barakkirnar í Jónas Broncksgøtu





**Hesar myndirnar eru av barakkunum, sum vórðu bygdar eystanfyri Jónas Broncksgøtu undir krígnum. Báðar myndirnar eru tiknar í 1943.**

Tá bretar komu higar í 1940, settu teir ikki minni enn 31 barakkir upp á hesum økinum, sum hýstu stórari deild av hermonnum. Eftir kríggið vórðu barakkarnar so við og við tiknar niður, og tilfarið kom væl við hjá havnarfólki.

Húsið fremst á niðaru myndini var kokkahúsið hjá bretum, tað húsið og barakkin oman fyri stóðu eftir at kríggið var liðugt. Tá arbeiðið upp á nýggju politistøðina byrjaði í 1964, vórðu hesar báðar barakkirnar tiknar burtur.

Nevnast kann, at kokkahúsið var fyrsta atelierið hjá Janusi Kamban, hann flutti inn í tey í 1949, og var har til 1964. Skeltið „Staff only", sum bretar hongdu upp omanfyri hurðina í 1940, var hangandi líka til barakkin bleiv tikin niður í 1964.

Tey, sum hava okkurt av viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru vælkomin at ringja til Birgar Johannessen á tel. 314647 ella 214647.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!